## Tryggingarmálið burturblivið

Eftir at hava verið fast trætumál á hvørjum aðalfundi seinnu árini, gjørdu føroysku fótbóltsfeløgini í fjør eina samtykt um, at nú skuldi okkurt henda á tryggingarøkinum.

Aðalfundurin samtykti tá, at til komandi aðalfund skuldi nevndin í FSF hava kannað, hvussu ein tryggin av feløgum og leikarum kundi gerast, og hvat hendan kom at kosta, og miðjast skuldi fram ímóti, at eitt uppskot um málið skuldi leggjast fyri aðalfundin.

Aðalfundurin er í dag – leygardagin – men enn er tó einki, sum bendir á, at málið er avklárað. Í øllum førum verður einki uppskot um hetta lagt fyri aðalfundin, so lítið er at ivast í, at hetta verður eitt av málunum, sum fer at fáa drúgvastu umrøðuna, tá »ymiskt« kemur á skránna.

**-jm**

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 22.02 | 15.00 | VB-Tjaldur |
| 23.02 | 14.30 | Kyndil-Stjørnan |
| 23.02 | 14.30 | VÍF-Neistin |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 23.02 | 16.00 | Kyndil-KÍF |
| 23.02 | 16.00 | StÍF-Tjaldur |
| 23.02 | 16.00 | VÍF-Neistin |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 23.02 | 13.00 | Fleyr-TB |
| 23.02 | 13.00 | ÍF-Mjølnir |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 23.02 | 15.00 | Fram-SÍ |
| 23.02 | 15.00 | ÍF-Mjølnir |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 4 | 4 - 0 - 0 | 416 | 342 | 74 | 17 |
| 2 | VÍF | 5 | 3 - 1 - 1 | 391 | 325 | 66 | 15 |
| 3 | Stjørnan | 3 | 1 - 0 - 2 | 317 | 319 | -2 | 10 |
| 4 | Kyndil | 4 | 2 - 0 - 2 | 388 | 395 | -7 | 10 |
| 5 | Neistin | 4 | 1 - 0 - 3 | 315 | 342 | -27 | 7 |
| 6 | StÍF | 3 | 0 - 1 - 2 | 350 | 380 | -30 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 3 | 1 - 0 - 2 | 300 | 374 | -74 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 3 - 0 - 1 | 494 | 407 | 87 | 15 |
| 2 | StÍF | 3 | 1 - 2 - 0 | 428 | 375 | 53 | 13 |
| 3 | Neistin | 3 | 1 - 1 - 1 | 422 | 392 | 30 | 12 |
| 4 | Kyndil | 3 | 1 - 1 - 1 | 397 | 397 | 0 | 9 |
| 5 | KÍF | 4 | 1 - 1 - 2 | 410 | 441 | -31 | 8 |
| 6 | H71 | 4 | 2 - 0 - 2 | 409 | 463 | -54 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 3 | 0 - 1 - 2 | 376 | 461 | -85 | 4 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 16 | 13 - 3 | 43 | 14 | 29 | 19 |
| 2 | ÍF | 16 | 13 - 3 | 43 | 18 | 25 | 18 |
| 3 | TB | 16 | 12 - 4 | 41 | 15 | 26 | 16 |
| 4 | Dráttur | 17 | 7 - 10 | 26 | 38 | -12 | 9 |
| 5 | Fleyr | 16 | 3 - 13 | 13 | 41 | -28 | 5 |
| 6 | KÍF | 17 | 1 - 16 | 8 | 48 | -40 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 13 | 11 - 2 | 35 | 8 | 27 | 14 |
| 2 | Mjølnir | 13 | 8 - 5 | 27 | 20 | 7 | 11 |
| 3 | SÍ | 13 | 7 - 6 | 23 | 21 | 2 | 11 |
| 4 | Fram | 12 | 6 - 6 | 22 | 20 | 2 | 8 |
| 5 | Fleyr | 13 | 0 - 13 | 1 | 39 | -38 | 0 |

# Avgerðin kann fella



*Vinna Mjølnir dystin á Kambsdali móti ÍF, hava tær meira enn aðra hondina á FM-steypinum, men hinvegin vil ein ÍF sigur viðføra, at gullstríðið aftur er víðopið*

**Talan kann verða um avgerandi dystin í FM-stríðnum, tá Mjølnir vitjar á Kambsdali hetta vikuskiftið, og hjá TB er sigurin eitt krav, tá tær vitja í Havn**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Kunning frá FBF*

Steypavinnararnir av Tvøroyri hava á pappírinum lættari dyst enn í finaluni, og kravið er eisini ein sigur, um so er, at greipan aftur í ár skal fara suður um fjørð. Fleyr sær ikki út til at fáa skil á spælinum, tó at ávís framgongd er at hóma. Hjá TB ræður um at halda dampin uppi og ikki taka dystin ov lættliga. Slíkt er hent fyrr.

### Styrkiroyndin

ÍF var fyri fyrstu ferð í steypafinaluni, men tað gekk ikki sum ætlað, hóast munurin var lítil. Nú er so føroyameistaraskapurin eftir, og har má og skal dysturin ímóti Mjølni vinnast. Mjølnir hevur rættiliga tikið ferð á seg í seinnu hálvu, og liðið er hvat formi viðvíkur best fyri av teimum trimum, ið kappast um gullið. Vinnur Mjølnir henda dystin, so fara tær 3 stig fram um næsta liðið, og eru aðrir FM-vinnarar tá bara teoretiskir, tí Mjølnir hevur eftir henda dystin bara tríggjar dystir eftir at leika, og tveir av teimum eru ímóti KÍF og Fleyr. So fyri at halda spenningin má ÍF vinna.

# ÍF er heilt nær gullinum

**Vil væl til hjá fuglfirðingum, so kunnu teir rópa seg FM-vinnarar, tá sunnudagurin er farin aftur um bak**

MANSFLOGBÓLTUR
*Kunning frá FBF*

Báðir dystirnir í meistaradeildini hetta leikumfarið hanga líkasum saman. ÍF kann gerast FM-vinnari longu hetta leikumfarið. Vinna teir á Mjølni á Kambsdali og Fram vinnur á SÍ í Havn, so er alt avgjørt.

Dysturin í Havn er rættiliga opin, tí SÍ vísti í steypafinaluni, at liðið er ógvuliga sterkt, og Fram hevur hetta kappingarárið vunnið á øllum hinum liðunum, men høvuðstrupulleikin hjá teimum hevur verið, at spælið er ov óstøðugt.

Á Kambsdali er støðan nakað tann sama. ÍF hevur helst sterkastu manningina, men teir eru tó at tosa við, og Mjølnir skal bara finna somu uppskrift sum í Klaksvík seinast, so er alt møguligt. Eins og hjá kvinnunum er neyðugt fyri at varðveita spenningin, at í hvussu er Mjølni vinnur og heslt eisini SÍ.

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 127 | (25) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 118 | (36) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 114 | (40) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 113 | (56) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 106 | (16) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 106 | (33) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 104 | (31) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 99 | (20) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 75 | (21) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 72 | (4) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 71 | (1) |
| Alina Olaru | StÍF | 71 | (7) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 65 | (6) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 58 | (9) |
| Laila Jespersen | VB | 57 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 130 | (15) |
| Damir Oros | KÍF | 125 | (26) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 108 | (19) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 106 | (2) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 89 | (7) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 89 | (21) |
| Ingi Olsen | VÍF | 84 | (18) |
| Áki Olsen | VÍF | 82 | (6) |
| Áki Mørk | Neistin | 78 | (22) |
| John Zachariasen | VÍF | 75 | |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 70 | (14) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 65 | |
| Finnur Hansson | Kyndil | 63 | (10) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 61 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 60 | (20) |



# VB skal bara halda tørn

**Umførini til kappingarlok styttast, og í verandi støðu skal VB bert halda tørn, tá Tjaldur kemur á vitjan**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá VÍF sunnudagin hevur leikt sín dyst ímóti Neistanum, er endaspælið hálvrunnið fyri teirra viðkomandi. Ilt er sjálvandi at siga, hvussu støðan sær út tá, men er hon ikki stórvegis broytt í mun til støðuna í dag, so er tíðin sum føroyameistarar nú um at renna undan hjá VÍF.



*Við nýggjum venjara skal Kyndil skjóta seg leyst á bronsuplássinum, tá Stjørnan kemur á vitjan sunnudagin*

### Skulu halda tørn

Fyri tveimum vikum síðani tók VB steypaheitið frá VÍF, og einki er at ivast í, at FM-gullið er næsta málið. Og VB hevur eisini allar møguleikar at gera av sjálvar, hvørt gullið í ár skal suður til Vágs. Tær eru í løtuni tvey stig framman fyri VÍF. Tær hava leikt ein dyst færri enn VÍF, og sum dystarskráin er, so hava tær eisini lagt fleiri av teimum á pappírinum truplastu útidystunum aftur um bak.

Leygardagin fær VB vitjan av Tjaldri. Talan er um dyst, sum varð útsettur á sinni, tá VB annars skuldi spælt lands- og steypakapping dag um dag, og tað er lítið at ivast í, at her er talan um tvey trygg stig til vágbingarnar. Líka so væl sum VB í ár hevur tikið ognarrætt upp á oddasessin, hevur Tjaldur í ár verið á aftasta plássinum, og ilt er at ímynda sær, hvussu tær skulu vinna seg av hesum. Og undir øllum umstøðum verður hetta neyvan gjørt suðuri í Vági, har gullsmakkurin nú av álvara tykist vera komin millum viðhaldsfólkini.

### Elddópur hjá Kyndilsvenjaranum

Einasti avbjóðarin hjá VB, VÍF, hevði stórar trupulleikar í sínum seinasta dysti, sum var ímóti Tjaldri, og yvir høvur tykist tað so, at VÍF hevur havt ógvuliga trupult við at finna rætta lagið í ár. Ikki minst í endaspælinum, har spælið sjáldan hevur verið av tí sannførandi slagnum.

Móti Neistanum er tó lítið at ivast í, at VÍF mugu roknast sum favorittar. Innanhýsis uppgerðirnar í ár eru allar endaðar við tryggum VÍF sigri, og nú má tað skjótt eisini standa teimum Vestmanna greitt, at tað er álvara. Tær kunnu ikki longur sjálvar gera av, hvørt tær skulu endurvinna VB, men undir øllum umstøðum kunnu tær syrgja fyri, at spenningurin verður varðveittur fram til seinasta umfarið.

Seinasti dysturin verður í Havn, har Kyndil skal taka ímóti Stjørnuni. Hetta er eisini dysturin um, hvat lið skal fáa munin í bronsudystinum, áðrenn seinasti fjórðingurin av kappingarárinum byrjar. Hjá Kyndli er hetta harumframt eisini fyrsti dysturin við Petur Martin Johansen sum venjara, og spennandi verður at vita, hvørt hetta er nóg mikið til at lyfta liðið úr naggatódnini, sum hevur valdað seinastu árini.

# Bót og treytaðan dóm fyri linjuverjaáálop

**Føroya Rættur feldi hósdagin dóm, har ein fótboltsáskoðari varð dømdur at rinda bót, umframat at taka við treytaðum dómi fyri at gjørt seg inn á linjuverjan í dystinum millum GÍ og B36**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

20 dagar treytaðan dóm, sum er galdandi í eitt ár, og 2.000 krónur í bót.

Tað var dómurin, sum Føroya Rættur feldi, tá úrskurður í málinum um linjuverjaálopið í Gøtu var gjørdur hósdagin.

Rættarmárið er uttan iva hitt fyrsta av sínum slag í Føroyum, og tí eru ivaleyst fleiri, sum hava fylgt hesum stórum áhuga.

### Nøgdir um dómin

Ikki minst hevur dómarafelagið fylgt væl við í málinum, og eftir úrskurðin segði formaðurin í felagnum, Petur Skarðenni, at teir sum heild vóru nøgdir við dómin.

- Sjálvandi kann eg ikki siga at eg fegnist, tí tað er avgjørt ikki ynskiligt, at slíkar støður taka seg upp, men fyri føroysku dómararnar er hetta ein sigur, og vit eru glaðir um, at tað við hesum verður staðfest, at slíkur atburður ikki verður góðtikin. Fyri okkum var talan um eitt prinsipp-mál, og nú er tað so staðfest, at slíkar hendingar fáa avleiðingar.

- Eg kundi kanska hugsað mær, at dómurin ikki var treytaður, tí talan er jú um álop, men fyri okkara viðkomandi er málið nú avgreitt, og vit fara so ikki at gera meira við tað, heldur formaðurin.

Tað er enn ikki vist, um ákærdi áskoðarin tekur við dóminum, ella um hetta verður skotið inn fyri hægri rætt.

### Vánaligt

At talan skuldi gerast um slíkt prinsipp mál hjá dómarafelagnum, kann í sjálvum sær tykjast løgið. FSF hevur annars gjørt reglur, har tað millum annað verður staðfest, at tað er heimaliðið, sum hevur ábyrgdina av trygdini hjá dómarunum. Hartil varð eftir tilburðin í Klaksvík fyri tveimum árum síðani staðfest, at um slíkir tilburðir íkomu, skuldi heimaliðið finna fram til, hvør viðkomandi persónurin var.

Tí kann tað í hesum føri tykjast heldur løgið, at FSF ikki nýtti lógina til at geva GÍ eina bót, sum eftir fordømum helst vildi verið 10.000 kr. Ein bót, sum GÍ uttan víðari kundi sent víðari. Hetta varð tó ikki gjørt, tí kappingarnevndin staðfesti, at GÍ hevði yvirhildið sínar skyldur, og tí gjørdist neyðugt hjá dómarunum at fara rættarinnar veg. Eitt stig, sum Petur Skarðenni eisini harmast.

- Eg má siga, at eg haldi tað vera út av lagi vánaligt, at vit sum áhugafelag hjá dómarunum mugu standa og stríðast fyri limunum á hendan hátt. Vit høvdu sjálvandi roknað við, at FSF av sínum eintingum fór inn og handlaði, men hóast lógin greitt talar fyri hesum, so søgdu teir seg ikki kunna gera nakað. Nakað annað er so tað, at formaðurin í kappingar- og dómaranevndini er tann sami, og tað gevur okkum so nakrar trupulleikar.

- Ikki soleiðis at málið er persónligt. Men hevur maðurin fyrst tikið eina avgerð sum kappingarstjóri, so nyttar einki hjá okkum at ráðføra okkum við dómaranevndina, tí har er sami maður, og tá kann hann sjálvandi ikki fara at undirgrava sína egnu avgerð, sigur Petur, sum í sama viðfangi leggur afturat, at í so máta er ivaleyst heppið, at aðalfundurin hjá FSF liggur bert tveir dagar eftir, at dómur varð sagdur í málinum.

- Har hava vit so í øllum førum talurætt, og hann ætla vit so at nýta. Vit eru í grundini bert eitt áhugafelag, og hava tí ongar heimildir til at taka nøkur stig mótvegis FSF, men tá tú hoyrir, at summir persónar í FSF ikki hava tikið hetta málið í serligum álvara, so er okkurt galið, og tað vilja vit helst vísa á, sigur Petur Skarðenni at enda.

Annars hevur sjálvt dómarafelagið aðalfund fyrst í komandi mánaði, og lítið er at ivast í, at málið fer at fáa drúgva umrøðu á tí fundinum.